# Føroyar, tá sólin í tindrandi megi...

*Myndir: Maria Olsen og Eydna Skaale*

Um alt landið leitaðu føroyingar sær út at njóta sólina. Børn og vaksin løgdu blygdina til viks, og lótu sólina baka á hvítu kropparnar.

Við allar strendur og áir vóru fólk meir og minni hálvnakin, og summastaðni mintu smáu sandirnir mest um strendurnar í suðurlondunum.

Summi vóru, sum nýttu góðu løturnar at fáa hoyggið til høldar, heldur enn at leggja seg uppá longs, og onkustaðni høvdu fólk mat og teppi við í hoyna, soleiðis, at tey kundu gera bæði.

Í havum og á trappusteinum mundu flestu føroyingar festa sær í grillirnar, sum eisini løgdu sín eyðkenda anga yvir landið alt.

Sosialurin var úti við myndatólinum.

**eys**





















